Álit II

í

løgtingsmáli nr. 59/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (Heimild at stovna almannagagnlig bústaðafeløg, økt lániheimild og útlendsk fígging o.a.)

Landsstýriskvinnan í umhvørvismálum, Ingilín D. Strøm, hevur lagt málið fram tann 18. desember 2023, og eftir 1. viðgerð tann 23. januar 2024 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 13., 20., 22. og 27. februar 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Áhugafelagið lutaíbúðir, MARK, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsið, Felagið Peningastovnar, Kommunufelagið, Stýrið fyri Bústaðir, Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum, og Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnu í umhvørvismálum.

Við 3. viðgerð tann 2. mai 2024 varð málið beint aftur í nevnd.

Nevndin hevur síðani viðgjørt málið á fundi tann 14. mai 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Stýrið fyri Bústaðir og Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnu í umhvørvismálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hervør Pálsdóttir, Kristianna Winther Poulsen, Kim Durhuus og Henrik Old) hevur hesar viðmerkingar:

Nevndin hevur fingið upplýst, at langtíðarhaldførið hjá Bústøðum er nøktandi. Tað er serliga raksturin og rentukostnaðir, ið tyngja Bústaðir. Tað verður tó arbeitt við at lætta um raksturin. Somuleiðis er tað upplýst, at í verkætlanum í framtíðini er neyðugt at fáa byggikostnaðin so langt niður sum gjørligt, umframt at byggja meira saman við øðrum. Við hesum uppskotinum verður nú eisini møguligt hjá Bústøðum at stovna almannagagnlig bústaðarfeløg saman við kommununum.

Teir spurningar, sum løgtingsgrannskoðararnir hava reist, skulu takast í álvara. Tað er upplýst fyri nevndini, at tað verður arbeitt við at bøta um fleiri av teimum viðurskiftunum, sum frágreiðingin hjá

landsgrannskoðanini vísir á. Tað verður arbeitt við at trimma raksturin, at finna loysnir fyri at fáa byggikostnaðin niður og at fáa planlagt viðlíkahald.

Bústaðir arbeiða eftir bústaðarpolitikki landsins. Tað er tó neyðugt at endurskoða bústaðarpolitikk landsins. Tað hava landsstýriskvinnan við bústaðarmálum og mong onnur víst á. Samstundis er eisini tørvur á, at Bústaðir kunnu halda fram við sínum virksemi fyri at fáa fleiri bústaðir á føroyska bústaðarmarknaðinum.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Helgi Abrahamsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Tá hetta uppskotið var til 3. viðgerð, bleiv tað beint aftur í nevnd, eftir at Landsgrannskoðanin var komin við eini sera atfinningarsamari frágreiðing viðvíkjandi haldførinum hjá Bústøðum. Løgtingsfólk settu spurnartekn við, hvussu rætt tað var at hækka lániheimildina við 350 mió. krónum, samstundis sum ivamál varð reist um haldførið hjá grunninum.

Rættarnevndin hevur bara viðgjørt málið á einum fundi, síðani tað varð beint aftur í nevnd, og tað var bara landsstýriskvinnan, saman við umboðum fyri Bústaðir, sum var innkallað í nevndina. Rættarnevndin fekk eisini, frá landsstýriskvinnuni, eina haldføriskanning viðvíkjandi Bústøðum.

Landsstýriskvinnan greiddi nevndini frá, at raksturin hjá Bústøðum er tungur, og at neyðugt er at gera umleggingar. Til spurningin, hvussu raksturin verður umlagdur, fekk nevndin at vita, at Bústaðir fara millum annað at brúka meira KT í samskiftinum við kundarnar. Lánini, sum øll hava skiftandi rentu, verða eisini umløgd til fasta rentu, men torført er at siga, nær rætta løtan er at gera tað. Framtíðar bústaðarbyggingar mugu eisini gerast bíligari enn higartil. Tað verður gjørt við at byggja meira uppeftir, og bygningarnir skulu ikki hava skeivar vinklar. Økini uttanum skulu eisini gerast soleiðis, at tey krevja minni viðlíkahald. Men ilt er at meta um, hvussu nógv bíligari bygningarnir fara at verða orsakað av hesum.

Í haldføriskanningini verður víst á nógvar óvissur. Størsta óvissan er rentan. Í framrokningunum er rentan fastlæst til 4,6% um árið, men um hon skuldi hækkað upp til 6,5%, so høvdu rentuútreiðslurnar verið øktar við uml. 8,2 mió. krónum árliga, og tað hevði aftur havt við sær, at Húsalánsgrunnurin var undir trýsti við langtíðarhaldførinum. Eisini prísvøksturin, sum hevur verið stórur seinastu árini, kann hava stóra ávirkan á haldførið.

Í fyriliggjandi lógaruppskoti verður skotið upp at gera nógvar broytingar, og tí varð landsstýriskvinnan spurd, um hon hevði tikið undir við, at lániheimildin bleiv tikin burturúr uppskotinum, meðan hinar broytingarnar stóðu eftir. Hesum tók hon ikki undir við.

Minnilutin mælir enn sum áður Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið. Umframt grundgevingarnar, sum vórðu nevndar í fyrra álitinum, verður víst til ógreiðu støðuna viðvíkjandi haldførinum. Vit ivast stórliga í, um ein so lemjandi atfinning viðvíkjandi haldførinum verður rættað einans við at brúka meira KT og við at byggja hægri og við færri skeivum vinklum. Jú alt gera mun, men vit eru als ikki sannførd um, at hetta er nóg mikið.

Við hesum viðmerkingunum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 15. mai 2024

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen næstformaður	Kristianna W. Poulsen
Henrik Old	Kim Durhuus	Steffan Klein Poulsen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur